**Almannamálaráðið**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 8. aug. 2022 |
| Mál nr.: | 22/12461-8 |
| Málsviðgjørt: | HP |
| Ummælistíð: | 8. aug. til 26. aug. 2022 |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um familjuískoyti**
(Oljuískoyti til húski)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 160 frá 24. desember um familjuískoyti, sum broytt við løgtingslóg nr. 167 frá 20. desember 2017, løgtingslóg nr. 187 frá 21. desember 2018, løgtingslóg nr. 65 frá 9. mai 2019, løgtingslóg nr. 18 frá 10. mars 2020 og løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021 verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Aftan á § 1 verður sett:

“**§ 1 a.** Oljuískoyti kann veitast til húski, ið kann skjalprógva útreiðslur til olju til upphiting av bústaði, har tey sambært fólkayvirlitinum eru skrásett at búgva.
*Stk. 2.* Treytin í § 1, stk. 1 um, at húskið skal hava heimabúgvandi børn undir 18 ár, er ikki ein treyt fyri at fáa rætt til oljuískoyti.
*Stk. 3.* Húski sambært hesi grein eru allir persónar 18 ár ella eldri, ið sambært fólkayvirlitinum eru skrásettir at búgva í bústaðnum.”

**2.** Aftan á § 2 a. verður sett:

“**§ 2 b.** Oljuískoyti er 7.000 kr. og kann útgjaldast eina ferð.
*Stk. 2.* Húski, ið telur ein vaksnan, sum í mesta lagi hevur inntøkugrundarlag uppá 290.000 kr., kann fáa oljuískoyti.
*Stk. 3.* Húski, ið telur tvey ella fleiri vaksin og 0, 1 ella 2 børn, har inntøkugrundarlagið í mesta lagi er 390.000 kr., kann fáa oljuískoyti.
*Stk. 4.* Húski, ið telur tvey ella fleiri vaksin við 3 ella fleiri børnum, har inntøkugrundarlagið í mesta lagi er 410.000 kr., kann fáa oljuískoyti.”

**3.** Aftan á § 4 verður sett:

“**§ 4 a.** Í sambandi við oljuískoyti skal inntøka hjá øllum vaksnum persónum í húskinum roknast við í inntøkugrundarlagið.
*stk. 2.* Inntøkugrundarlagið, sum oljuískoyti er grundað á, er inntøkan nevnd í § 7, stk. 1 og 3.
*Stk. 3.* Fyri A-inntøku er inntøkutíðarskeiðið, sum oljuískoyti verður grundað á, inntøkan seinastu 12 mánaðirnar. Fyri B-inntøku og vinning sbrt. kapitalvinningsskattalógini er inntøkutíðarskeiðið, ið oljuískoytið verður grundað á, inntøkan seinasta álíknaða inntøkuár.
*Stk. 4.* Sum skjalprógv fyri inntøkur sambært stk. 1 verða nýttar eitt nú uppgjørdar sjálvuppgávur og endauppgerðir frá TAKS, kontoavrit frá fyribilsskattaskránni hjá TAKS, váttan frá Studna ella útlendskum stuðulsveitara um lestrarstuðul.”

**4.** Aftan á § 8 verður sett:

“**§ 8 a.** Umsókn um oljuískoyti skal latast Almannaverkinum. Serligt umsóknarblað skal nýtast, tá søkt verður um oljuískoyti.
*Stk. 2.* Umsókn um oljuískoyti skal vera Almannaverkinum í hendi í seinasta lagi 30. november 2022.
*Stk. 3.* Almannaverkið kann heinta inn upplýsingar av týdningi fyri viðgerð av málum um oljuískoyti frá skattamyndugleikum, Landsfólkayvirlitinum, kommunalum myndugleikum og øðrum viðkomandi, ið hava kunnleika til viðurskiftini.
*Stk. 4.* Oljuískoyti verður útgoldið sum ein upphædd til ein persón í húskinum.”

**5.** Aftan á § 10 verður sett:

“**§ 10 a.** Hevur persónur av órøttum fingið oljuískoyti, og átti hann at vitað um hetta, eru ásetingarnar í § 10 galdandi.”

**6.** Aftan á § 11 verður sett:

“**§ 11 a.** Oljuískoyti kann ikki verða veitt húski, ið telur eitt ella tvey vaksin, um tey eiga ogn, ið er mett til eina upphædd omanfyri 30.000 kr.
*Stk. 2.* Oljuískoyti kann ikki verða veitt húski, ið telur trý ella fleiri vaksin, um tey eiga ogn, ið er mett til eina upphædd omanfyri 50.000 kr.
*Stk.* 3. Ogn sbrt. stk. 1 og 2 er ogn nevnd í § 11, stk. 2 og 3.”

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og fer úr gildi 1. januar 2023.

**Kapittul 1. Almennar viðmerkingar**

**1.2. Orsakir til uppskotið**
Hækkingin í prístalinum hevur verið óvanliga stór í 1. og 2. ársfjórðingi í 2022 og rakar breitt og ymiskt og ávirkar fíggjarligu umstøðurnar hjá flestu húskjum. Nøkur húski verða tó rakt harðari enn onnur. Ein høvuðsorsøk til samlaðu hækkingina í prístalinum er hækkingin í prísi á brenniolju til húsarhald.

Tað hevur týdning undir tílíkum umstøðum, at landið ikki stimbrar búskapin óneyðugt og økir um eftirspurningin, tí tað kann fáa øvugtan virknað. Tað hevur týdning, at húsarhaldini so vítt gjørligt sjálvi tillaga seg og umleggja sína nýtslu eftir broyttu umstøðunum. Húski, sum eru bundin at útreiðslum, og sum hava lágar inntøkur hava avmarkaðar møguleikar at tillaga seg, og tí ynskir landsstýrið at veita eina hjálpandi hond til tey, sum eru ringast fyri. Sostatt ynskir landsstýrið at minka um ringastu avleiðingarnar av prísvøkstrinum og fer við hesum uppskoti at veita fíggjarligan stuðul til húski við lágum inntøkum, sum ikki hava ognir av týdningi, og sum brúka olju til upphiting av bústaðnum.

**1.2. Galdandi lóggáva**
Hækkandi prísstøði er ikki at rokna sum ein almannahending, ið gevur rætt til veiting frá tí almenna. Tað er sostatt ikki nøkur skipan, ið loftar familjum, sum hava trupulleikar við at fáa endarnar at røkka í gerandisdegnum. Í løgtingslóg um almannapensjónir og í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur er heimild til í avmarkaðan mun at hjálpa persónum fíggjarliga í mun til ávísar útreiðslur, men talan er ikki um skipanir, ið eru egnaðar at brúka til fíggjarligan stuðul í sambandi við hækkandi kostnaðarstøði í landinum.

Løgtingslóg um familjuískoyti, ið kom í gildi í 2016, hevur til endamáls at minka um avleiðingarnar av fátækradømi. Sambært løgtingslógini verður fíggjarligur stuðul veittur barnafamiljum við lágum inntøkum. Tað er ein treyt fyri at fáa rætt til familjuískoyti, at uppihaldarin av barninum og møguligur hjúnafelagi ella maki ikki hava ognir hægri enn 30.000 kr. (við ognir er at skilja innistandandi í peningastovni og virðisbrøv).

Familjuískoyti er ein skattafrí veiting, sum er tengt at inntøku, parlagsstøðu og tal av børnum. Tey við lægstu inntøkunum fáa hægri stuðul enn tey við høgum inntøkum. Hjá teimum við einum barni, er hægst møguliga upphædd 4.000 kr. um mánaðin. Upphæddin hækkar við 500 kr. fyri hvørt barnið aftrat tí fyrsta.

Ein stakur uppihaldari við inntøkugrundarlag lægri enn 120.000 kr. um árið fær fulla upphædd. Upphæddin lækkar stigvíst, so hvørt inntøkan hækkar og dettur burtur, tá inntøkugrundarlagið fer uppum 290.000 kr. Eitt par fær fulla upphædd, tá inntøkugrundarlagið hjá báðum tilsamans er lægri enn 220.000 kr. Familjuískoyti til pør dettur burtur, tá inntøkugrundarlagið fer uppum 390.000 kr. (410.000 kr. um tey hava 3 ella fleiri børn).

Familjuískoyti er ikki á nakran hátt tengt at bústøðu og er ikki tengt at útreiðslum hjá tí einstøku familjuni. Tað merkir t.d., at tey, sum hava leigubústað og rinda høga húsaleigu, hava somu rættindi sum staki uppihaldarin, ið býr inni hjá egnum foreldrum og ikki rindar húsaleigu.

Tað eru umleið 250 til 300 familjur, ið hvønn mánað móttaka familjuískoyti. Harav eru 30 til 35 pør, meðan restin eru stakir uppihaldarar.

Familjur, sum fáa familjuískoyti, hava eisini rætt til annan barnastuðul. Øll, sum hava børn, hava rætt til barnafrádrátt í skattinum. Inntøkan hjá teimum flestu, sum fáa familjuískoyti, er somikið lág, at tey hava rætt til fíggjarligt frípláss, um børnini eru í dagstovnaaldri. Stakir uppihaldarar hava rætt til barnaískoyti til stakar uppihaldarar. Harumframt fáa stakir uppihaldarar vanliga eisini barnagjald (sum ikki er ein almennur stuðul men eitt gjald frá einum foreldri til hitt). Allar stuðulsskipanirnar nevndar omanfyri eru knýttar at barninum. Familjur og persónar, ið ikki hava børn yngri enn 18 ár, hava ikki rætt til hendan stuðulin.

**1.3. Endamálið við uppskotinum**

Endamálið uppskotinum er at minka um ringastu avleiðingarnar av prísvøkstrinum, ið hevur verið síðstu mánaðirnar. Sambært uppskotinum kunnu húski, sum lúka treytirnar um inntøku og ogn, og sum kunnu skjalprógva útreiðslur til olju til upphiting av bústaðnum, har tey búgva, fáa rætt til oljuískoyti. Oljuískoyti er ein eingangsupphædd á 7.000 kr.

Familjuískoyti verður einans veitt til barnafamiljur, sum hava børn upp til 18 ár. Tað eru umleið 250 til 300 familjur, sum hvønn mánað fáa familjuískoyti, harav umleið 30-35 eru pør, meðan restin eru stakir uppihaldarar. Tað eru eisini onnur enn barnafamiljur, sum hava fíggjarliga trong kor, sum merkja avleiðingarnar av prísvøkstrinum. Tí verður skipanin við hesum uppskotinum í eitt avmarkað tíðarskeið víðkað soleiðis, at onnur enn barnafamiljur kunnu søkja um nýggju veitingina, ið nevnist oljuískoyti. Oljuískoyti verður sostatt veitt húskjum – bæði teimum við børnum og uttan børn. Tað er heldur ikki aldursmark, og tað merkir, at eisini fólkapensjonistar kunnu fáa oljuískoyti, um tey brúka olju til upphiting av bústaðnum, og um treytirnar viðvíkjandi inntøku og ogn eru loknar.

Ein fyrimunur við at brúka skipanina og løgtingslógina um familjuískoyti til endamálið er, at veitingin er lutfalsliga einføld at umsita. Familjuískoyti røkkur teimum, sum hava lága inntøku og ikki hava ogn av týdningi. Men tað eru ikki øll, sum móttaka familjuískoyti, ið hava høgar útreiðslur, og tað eru ikki øll, sum eru eins hart rakt av prísvøkstrinum. Við hesum uppskotinum verður so tann treyt løgd aftrat, at húski skal hava útreiðslur til olju í sambandi við upphiting av bústaðnum.

Verandi familjuískoyti verður sum nevnt veitt til stakar uppihaldarar og pør við børnum. Familjuískoyti er ein stuðul til tann ella tey, ið uppihalda barninum, og í tí sambandi er tað einfalt at definerað familjuna – tað er sum nevnt uppihaldarin/foreldur ella ein uppihaldari og møguligur nýggjur maki.

Tað er einans inntøkan hjá tí staka uppihaldaranum ella hjá parinum, sum barnið býr saman við, sum verður brúkt sum inntøkugrundarlag í sambandi við familjuískoyti. Eisini hóast hesi búgva saman við øðrum (t.d. inni hjá egnum foreldrum).

Við oljuískoytinum verður tað øðrvísi, tí tað verða eisini familjur uttan børn, ið kunnu fáa rætt til veitingina. Tað eru nógvar ymiskar familjutýpur, og tað eru nógvir ymiskir hættir, sum húski innrætta seg, sum ikki neyðturviliga byggja á siðbundin familjumynstur. Eru tað fleiri vaksin í einum húski, tá verður spurningurin, hvør inntøka skal telja við í inntøkugrundarlagið. Og ein kann spyrja, um tað ikki er rímiligt, at øll í húskinum eru við til at gjalda fyri ta olju, sum skal til fyri at hita bústaðin. Tí er tað húskið, sum skal søkja um oljuískoyti.

Sostatt er tað inntøkur hjá øllum persónum 18 ár ella eldri, sum búgva í bústaðnum, ið telja við í inntøkugrundarlagið. Lýkur húskið treytirnar, og samlaða inntøkan er lægri enn

inntøkumørkini í hesum lógaruppskotinum, verður oljuískoytið á 7.000 kr. veitt húskinum. Upphæddin verður útgoldin sum ein upphædd til ein persón í húskinum.

Í praksis væntast oljuískoyti í stóran mun at verða veitt teimum, sum búgva einsamøll (við og uttan børn) ella eru tvey vaksin. Eru tað fleiri vaksin, sum búgva saman verður truplari at lúka treytirnar um inntøku og ogn.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**

Verandi skipan við familjuískoyti verður víðkað soleiðis, at tað eisini verður veitt eitt oljuískoyti. Oljuískoyti verður veitt eftir umsókn til húski við lágum inntøkum, sum ikki hava ognir av týdningi, og sum brúka olju til upphiting av bústaðnum, har tey eru skrásett at búgva.

Tey, sum fáa umsóknina játtaða, fáa eitt útgjald eina ferð uppá 7.000 kr.

Treytirnar fyri at fáa rætt til oljuískoyti eru:

- Inntøka í mesta lagi:
    - Ein vaksin í húskinum: 290.000 kr.
    - Tvey ella fleiri vaksin í húskinum og 0, 1 ella 2 børn: 390.000 kr.
    - Tvey ella fleiri vaksin í húskinum og 3 ella fleiri børn: 410.000 kr.

- Ogn í mesta lagi:
    - Eitt ella tvey vaksin í húskinum: 30.000 kr.
    - Trý ella fleiri vaksin: 50.000 kr.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**

Lógaruppskotið hevur ligið til almenna hoyring á hoyringsportalinum hjá Føroya Landsstýri.

Harumframt er uppskotið sent hesum til hoyringar:

Almannaverkinum
Fakfelagssamstarvinum
Fíggjarmálaráðnum
Føroya Kommunufelag
Landsbankanum
Landsfelag Pensjonista
MEGD
Samtaki
Sosialráðgevarafelag Føroya
TAKS
Umhvørvisstovuni
Umhvørvis- og vinnumálaráðnum
Vinnuhúsinum

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið hevur við sær øktar útreiðslur til familjuískoyti í fíggjarárinum 2022, og ætlanin er at fíggja útreiðslurnar við eykajáttanarlóg. Lógin fer úr gildi við árskiftið 2022/23, og lógaruppskotið fær sostatt ikki avleiðingar fyri komandi fíggjarlógir.

Tað ber tó ikki til at meta um, hvussu stórar útreiðslurnar til endamálið verða í 2022. Oljuískoyti verður veitt húskjum, og tað merkir, at tað er ikki einstaklingurin sum søkir – tað er húskið, ið søkir. Tað eru sambært Hagstovuni gott 18.000 húski í Føroyum. Tað ber ikki til at siga, hvussu nógv av húskjunum lúka treytirnar fyri at fáa rætt til oljuískoyti.

Oljuískoytið er 7.000 kr. til hvørt húski. Verða tað 500 húski, sum fara at fáa oljuískoyti, verður útreiðslan 3,5 mió. kr., og verða tað 1000 húski verður útreiðslan 7 mió. kr.

Uppskotið hevur ikki við sær fíggjarligar avleiðingar fyri kommunur.

Tað ber ikki til at siga, í hvussu stóran mun lógaruppskotið fer stuðla undir prísvøkstur. At nøkur 100 ella 1000 húski fara at fáa 7.000 kr. meira at brúka, økir í ein ávísan mun eftirspurningin eftir vøru og tænastu. Men av tí at talan er um eina veiting, ið bert verður veitt einaferð, so avmarkar tað avleiðingarnar fyri búskapin.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið hevur við sær nakað av umsitingarligum avleiðingum fyri Almannaverkið. Allar umsóknir skulu málsviðgerast og skrásetast. Tað skulu gerast smávegis tillagingar í kt-skipanini, sum verða fíggjaðar við verandi játtan.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Tá familjur við lágum inntøkum og uttan ognir av týdningi fáa meiri pening um hendi, kann væntast nýtslan í samfelagnum økist nakað, og hevur tað avleiðingar fyri vinnuna.

Verandi skipan við familjuískoyti hevur ein innbygdan progressivitet og veitingin lækkar, so hvørt inntøkan hækkar. Skipanin virkar sostatt sum ein øktur markskattur, sum er við til at minka um arbeiðsútboðið. Hetta verður ikki galdandi fyri oljuískoyti, tí talan er um eina upphædd, sum bert verður veitt einaferð.

Uppskotið hevur sostatt bert smávegis avleiðingar fyri vinnuna.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Lógaruppskotið hevur avleiðingar fyri tey húski, sum fáa rætt til oljuískoyti á 7.000 kr. Tað væntast at vera ymiskir samfelagsbólkar, sum fara at fáa ágóðan av oljuískoytinum. Láginntøkubólkar eru serliga lesandi, fólka- og fyritíðarpensjonistar, stakir uppihaldarar, ið arbeiða niðursetta tíð o.o. Men nøkur av hesum eru partur av størri húski, og í tann mun, at onnur í húskinum hava inntøku ella ogn, tá dettur rætturin til oljuískoyti burtur.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri skyldur Føroya sambært Hoyvíkssáttmálanum, Evropeiska mannarættindasáttmálanum ella Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

**2.9. Markaforðingar**
Lógaruppskotið hevur ikki við sær kendar markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir ella avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki heimildir til landsstýrismannin, stovn undir landsstýrismanninum ella til kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**

Lógaruppskotið hevur ikki aðrar kendar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Ja | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Ja | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
*Til nr. 1*
Húski, sum hava útreiðslur til olju í sambandi við upphiting av bústaðnum, har tey sambært fólkayvirlitinum eru skrásett at búgva, kunnu søkja um oljuískoyti. Umsøkjari skal skjalprógva, at bústaðurin verður hitaður við olju. Tað er ásett, at húski skal hava útreiðslur til olju, og tað merkir, at um eitt húski hevur frían bústað og ikki rindar fyri at hita bústaðin, tá hevur húski ikki rætt til oljuískoyti. Um húski hevur eina húsaleigu, sum er íroknað forbrúk, tá skal húski skjalprógva, at útreiðslur til olju er partur av húsaleiguni.
Í mun til familjuískoyti, so er uppihaldsskylda mótvegis børnum ikki ein treyt fyri at fáa rætt til oljuískoyti. Tað merkir, at eisini húski, ið ikki hava børn, kunnu fáa oljuískoyti. Tað er onki aldursmark, og sostatt kunnu t.d. fólkapensjonistar fáa oljuískoyti, um treytirnar annars eru loknar.

*Til nr. 2*
Oljuískoyti er ein føst upphædd, ið er ásett til 7.000 kr. Oljuískoyti kann bert útgjaldast eina ferð til hvørt húski.

Tá tað í hesum lógaruppskoti stendur "vaksin", tá er talan um persón, ið er 18 ár ella eldri. Tá tað stendur "børn", tá er tað til og við 17 ár.

Fyri at fáa rætt til oljuískoyti skal inntøkugrundarlagið hjá húskinum í mesta lagi vera upphæddirnar, ið eru ásettar í § 2 b, stk. 2-4.

- Er talan um eitt húski við einum vaksnum, skal inntøkugrundarlagið í mesta lagi vera 290.000 kr. Hetta er uttan mun til, um persónurin hevur børn ella ikki hevur børn.
- Er talan um húski við tveimum ella fleiri vaksnum og við 0, 1 ella 2 børnum, skal inntøkugrundarlagið í mesta lagi vera 390.000 kr.
- Er talan um húski við tveimum ella fleiri vaksnum og við 3 ella fleiri børnum, skal inntøkugrundarlagið í mesta lagi vera 410.000 kr.

*Til nr. 3*
Í verandi skipan við familjuískoyti er tað uppihaldarin og møguligur hjúnafelagi/maki, sum søkja. Tá er tað bara inntøka og ogn hjá hesum, ið liggur til grund fyri rættinum til familjuískoyti. Sbrt. § 3 a, stk. 1 í hesum lógaruppskoti er tað alt húskið, ið søkir um oljuískoyti. Tað eru allir persónar, ið eru 18 ár ella eldri, sum sambært landsfólkayvirlitinum eru skrásettir at búgva á bústaðnum. Tað er sostatt inntøka og ogn hjá øllum, sum eru skrásett at búgva, sum telur við - eisini hóast hesi ikki hava nakað fíggjarligt tilknýti við hvønn annan.

Inntøkugrundarlagið, sum oljuískoyti skal grundast á, er tað sama sum við familjuískoyti. Fyri B-inntøku er inntøkutíðarskeiðið seinast álíknaða inntøkuár. Fyri A-inntøku er tað inntøkan seinastu 12 mánaðirnar. Í sambandi við A-inntøku er tó ein munur í mun til verandi skipan við familjuískoyti. Tað er tá inntøkan broytist, tá kann rættur til familjuískoyti grundast á inntøku frá tí mánaðinum, at inntøkan er broytt. Hetta er ikki galdandi fyri oljuískoyti. Tá kann ikki gerast frávik til seinastu 12 mánaðirnar.

Hátturin at rokna inntøkugrundarlagið er annars tann sami sum við familjuískoyti.

*Til nr. 4*
Umsókn um oljuískoyti skal latast Almannaverkinum á serligum umsóknarblaði.

Umsóknin skal vera Almannaverkinum í hendi í seinasta lagi 30. november 2022. Bert umsóknir, ið eru Almannaverkinum í hendi áðrenn freistina, kunnu verða játtaðar.

Sambært § 8 a, stk. 3 gevur umsøkjari Almannaverkinum heimild at fáa til vega upplýsingar frá øðrum viðkomandi myndugleikum.

Sambært § 8 a, stk. 4 verður oljuískoyti útgoldið sum ein upphædd til ein persón í húskinum. Tað merkir, at Almannaverkið t.d. ikki býtir upphæddina millum tveir ella fleiri partar av einum húski.

*Til nr. 5*
Hevur persónur av órøttum fingið oljuískoyti, tá eru somu reglur galdandi sum, tá borgari hevur fingið familjuískoyti av órøttum.

*Til nr. 6*
Treytirnar um ogn eru tær somu við oljuískoyti sum við familjuískoyti. Tó er tann munurin, at er talan um húski, ið telur trý ella fleiri vaksin, tá kunnu tey tilsamans hava ogn upp til 50.000 kr.

**Til § 2**
Ásett verður, at løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Lógin fer úr gildi 1. januar 2023 (freistin at søkja um oljuískoyti er 30. november 2022).

Almannamálaráðið, 26. juli 2022

**Sólvit E. Nolsø**
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3: